Ymiskt

FARTELEFON
Motorola A008 til sølu fyri bert 2.000 kr. Inniheldur m.a. e-mail, wap, browser, notesblok, opgaver, tegneblok, alarm, voice notes, spøl, kalendara, infrarød. Er uttan tastatur, bert skermur
Tlf. 212957

TIL SØLU
1 1/2 ára gamalt lítið brúkt JVS digitalt kamera til sølu. 800.000 pixl. 3,5 LcD skerm, steady shot 10x optisk sum, 300 x gigital sum v. battari, ladara, kabel til tv + teldu, red. Cd rom. 1 1/2 ára trygging. Nýprísur 13.000 kr. til sølu fyri 9.000 kr.
Tlf. 315811 ella 251702

MYNDATÓL VIÐ TASKU
Baver VCC 406, VHS movie við stativ – Bílora – bíliga til sølu.
Tlf. 422419

LOPPUMARKNAÐUR
verður í Framtíðini í Vági leygardagin 5. apríl. Lutir – ikki klæðir – kunnu latast inn í Framtíðini frígggjakvøldið 4. apríl millum kl. 18-20.
2x Suðuroyar Miðnámsskúli

MÁLNINGAR TIL SØLU
Tveir Jógvan Waagstein-málningar frá uml. 1930 til sølu til hægst bjóðandi.
Tlf. 317169

KØKUR
Brúktur køkur til sølu, væl egnaður til grovkøk.
Tlf. 721888/503522

INNHURÐAR
3 brúktar KOTO innhurðar v/karmi std. 80x210 til sølu fyri 250 kr. stk.
Tlf. 444789

NOKIA 7650
Smarta fartelefonin við digital-kamera, MMS, JAVA, Bluetooth, IR-port, GPRS, WAP, raddarstýring, mail og spølum. Til sølu fyri einans 3.400,- Virkar perfekt og uttan simlock.
Ring +4526275314

FARTELEFON
Sony Ericsson T 300 við MP3 spælara! Telefonin hevur litskiggja, fleirtónaðar ringitónar (MIDI), infrareytt sambánd, WAP 2.0, E-mail, MMS, SMS, spøl o.a. (Fløga við eyka spølum fylgir við). MP3 spælarin, ið eisini kann nýtast sum »headset« nýtir Multimediacard (MMC) - 32 mb fylgja við. Kostnaður 2200 kr.
Tlf. 218991

MØTAST AFTUR
20. okt. 2003 eru tað 40 ár síðani vit fermdust í Vestmanna kirkju. Skulu vit hittast aftur í Vestmanna 25. okt 2003 til eina hugnaløtu?
Katrin tlf. 314793, Ebba tlf. 421142 og Sigga tlf.

RADIATORUR
1,1m langur 65 cm breiður, 3 dupultur, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 747785 eftir kl. 17 447785

INNHURÐAR
Brúktar innhurðar við karmi til sølu fyri 300 kr. Ein innhurð við glasi 80x210 fyri 1.200 kr.
Tlf. 449130

PÁSKAREGGJA TOMBOLA
við 400 páskareggum verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 22. mars kl. 15.00. »Komið og vinnið nøkur páskaregg«. Eisini selja vit heitar pannukøkur v/ róma og súltutoy, kaffi/sunkist. Øll eru hjartaliga vælkomin.
KFUM-skótarnir í Kvívík

NOKIA 3330
við 5 coverum til sølu fyri 1300 kr.
Tlf. 319223

ÍTRÓTTARFELAGIÐ Í FUGLAFIRÐI
Í hevur eydnuhjól og matsølu í fimleikarhøll skúlans 2. mai.
Í F

MÁLARÍ
Eitt málarí av Sandagerði til sølu – málað av Waagstein str. 84 x 57. Tað er málað í 1947. Fyri ikki undir 20.000 kr.
Tlf. 254406

GARAGUHURÐ
Garaguhurð bíliga til sølu. Ongantíð brúkt.
tlf. 373739

MOTOROLA-V50
fartelefon 4 mør, gomul til sølu fyri 2.100 kr. Nýprísur ca. 3.500,- kr.
Tlf. 223930

LÍTIÐ BRÚKTUR
styrkisbonkur til sølu. Stong og 80 kg. av vektum fylgja við. Søluprísur 6.500 kr.
Tlf. 458111 ella 758111

GO-KART
til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 424129

MYNDATÓL TIL SØLU
11/2 ára gamalt, lítið brúkt Minolta 505si myndatól við blitsi, eini Tamron 28-300 mm. aspheriskari linsu og einum nýggjum, óbrúktum stativi til sølu. Nýprísur 13.500 kr. til sølu fyri einans 7.900 kr.
Tlf. 260590

LOPPUMARKNAÐUR
Loppumarknaður verður í VB-húsinum leygardagin 22. mars frá kl. 14.00 til 18.00. Lutir, IKKI KLÆÐIR, kunnu latast inn frígggjakvøldið 21. mars millum kl. 18.00 og 19.00. Møguleiki er eisini fyri at fáa lutir heintaðar.
Ringið tlf. 224168 ella 221454

* Dustsúgvarar
* Mikroovnar
* Kaffimaskinur
...og mangt annað
Elkeyp
... so einfalt
VA-BlACK 321 000

Kiropraktor
Ári Rasmussen

Viðtala fæst:
Argjum 320212
Runavík 448102

Grannskoðan • Ráðgeving
Bókhald • Skattamál
- og annað

Sosialurin - 311820
RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAD GRANNSKODARAFELAG P/F
An associated firm of
PricewaterhouseCoopers
Á GLAÐSHEYGGI - BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN - P/F NR. 267
TEL. (+298) 311017 - FAX (+298 311018)
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Heimasíða: www.rasmussen.fo

www.sosialurin.fo

HEILSANIR

Góða Halltóra og Dorrit
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum, sum var 15. mars. Alt tað besta frá
Okum í Sumba

Góða fitta Rósa
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi 20. mars. Muss og klemm frá
mammu, babba, Sannu og Masu

Góða elskaða Gurið
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum.
Mamma, Thorfinn, Stéfan Helgi, Gunnleyg og Anna

Góða Sigrun Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum 20. mars.
Ynskja mamma, babba, Albjørg og Jóan Karl

Góði elskaði Stéfan Helgi
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum.
Babba, Elinborg, Gurið, Gunnleyg og Anna

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

UTTAN ÚR HEIMI

40 rakettir eftir Saddam Hussein

Tað var fregnartænastan CIA, sum útnevndi tey fyrstu málini í amerikanska álopinum á Irak. CIA segði seg vita, hvar Saddam Hussein var, men hann varð tó ikki raktur

KRÍGGJ
Árni Joensen

Rakettálopið á mál í og uttan fyri Bagdad gjáranáttina var ikki eitt veruligt álop á Irak, men heldur ein amerikansk roynd at beina fyri irakska leiðaranum, Saddam Hussein.

Sambært blaðnum Washington Post hevði stjórin í fregnartænastuni CIA, George Tenet, ein fund við george W. Bush, forseta fyrrakvøldið, og har greiddi hann forsetanum frá, at CIA visti, hvar Saddam Hussein var staddur hetta kvøldið. Hetta vátta keldur í Hvítu Húsunum eisini fyri blaðnum.

- Vit vita, hvar Saddam er staddur júst nú, og vit vita eisini, hvar hann verður teir næstu tímarnar, skal George Tenet hava sagt á fundinum við forsetan.

Upplýsingarnar hjá CIA kundu, vóru tær rættar, havt við sær, at irakski leiðarin kundi fallið longu í tí fyrsta álopinum, og á tann hátt vónaði Bush at enda kríggið, longu áðrenn tað var byrjað, skrivar blaðið.

Sambært keldunum var Saddam Hussein fyrrakvøldið í einum av húsum sínum beint uttan fyri Bagdad, og tað var orsøkin til, at amerikansk herskip og kavbátar skutu ikki færri enn 40 Tomahawk-rakettir eftir málum nærhendis irakska høvuðsstaðnum.

Men Saddam Hussein varð ikki raktur. Gjáramorgunin kom hann á skíggjan hjá irakska sjónvarpinum og bað allar muslimar fara í heilagt kríggj ímóti USA fyri at hevna álopið á Irak.

Sambært Washington Post skal CIA-stjórin hava sagt George W. Bush, forseta, at hetta var helst seinasti møguleikin hjá CIA at siga, hvar irakski forsetin er staddur. Tá tann fyrsta rakettin er brostin, verður tað ógjørligt at siga, hvar hann er, skal George Tenet hava sagt við Bush.

Tann fyrsta rakettin ímóti Bagdad verður skotin avstað av amerikanska herskipinum "USS Bunker Hill".

Muslimskir felagsskapir hótta við hevnd

Tey sameindu hjá USA taka undir við amerikanska álopinum á Irak. Týskland og Russland ganga undan í at mótmæla, og muslimskir felagsskapir hótta við hevnd

KRÍGGJ
Árni Joensen

Avstralski forsætisráðharrin, John Howard, var ein tann fyrsti at gera viðmerkingar til amerikanska álopið á Irak. Hann endurtók, at Avstralia styðjar USA. Tað sama segði japanski forsætisráðharrin, Junichiro Koizumi. Eisini stjórnin í Filipsoyggjunum segði seg taka undir við álopinum.

Týskland, Frakland, Russland og Kina hava sum væntað mótmælt álopinum. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Moskva segði, at Russland harmast amerikansku avgerðina, og formaðurin í tjóðartinginum helæt, at tingið eigur at koma saman at fordøma amerikanska álopið.

Í Turkalandi vóru fleiri mótmælisgongur ímóti álopinum, og muslimskir felagskapir í Thailandi, Malaysia og Pakistan funnust hvassliga at amerikansku avgerðini at leypa á. Ein av teimum viðgongdu felagsskapunum í Pakistan segði, at USA fer at iðra seg um avgerð sína, tí við álopinum hevur USA sagt sín egna deyðadóm.

Á Filsipoyggjunum stuðlar stjórnin USA, men muslimsku felagsskapirnir í landinum søgdu í gjár, at amerikanarar skulu ikki kenna seg tryggar í framtíðini, sama hvar teir eru.

Blix harmast kríggið

Leiðarin á ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak, Hans Blix, harmast amerikansku avgerðina at leypa á Irak.

Í einari frágreiðing til ST-trygdarráðið skrivar Hans Blix, at arbeiðið hjá eftirlitsmonnunum hevur gingið framá, og at Iraka hevur samstarvað við eftirlitsmenninar um enn treyðugt. Hann viðgongur, at eftirlitsmenninir vóru ikki lidnir við arbeiðið, nú teir noyddust at fara úr Irak, men hann heldur, at altjóða samfelagið átti at givið teimum betri stundir at leita eftir ólógligum vápnum í Irak.

Hans Blix heldur, at Irak eigur at fáa viðurkenning fyri sín vilja at samstarva við vápnaeftirlitsmenninar.

Uttanríkiaráðharrarnir úr Fraklandi, Týsklandi og Russlandi søgdu í gjár, at tað ber framvegis til at loysa Irak-kreppuna á friðarligan hátt. Dominique de Villepin, Joschka Fischer og Igor Ivanov vístu á, at vápnaeftirlitsmenninir hava gjørt framstig í Irak, og at teir tí eiga at sleppa at halda fram við arbeiðinum.

Tryggja olju

Felagsskapurin hjá oljuútflytaralondunum, OPEC, kunngjørdi í gjár, at hann fer at tryggja, at nóg mikið av olju verður á altjóða marknaðinum, hóast amerikanarar og bretar hava lopið á Irak.

- Vit hava givið altjóða samfelagnum lyfti um at tryggja marknaðin, og tað lyftið fara vit at halda, segði ein talsmaður hjá OPEC í Wien.

Nú oljan úr Irak hvørvur av marknaðinum, noyðast summi OPEC-lond at økja sína framleiðslu, men sambært serfróðingum eru tað bara tvey av londunum, sum kunnu økja framleiðsluna so mikið, at tað munar.

Hava lurtað á ES-borgini

Tað hevur vakt stóran ans, at lurtiútgerð er funnin í fleiri av skrivstovunum á ES-høvuðsborgini í Bruxelles.

Ein tænastumaður hjá ES upplýsti í gjár, at lurtiútgerðin er funnin í hølum, sum vanliga verða nýtt til ráðharrafundir, og tí er málið mett at vera sera álvarssamt. Sambært tænastumanninum er útgerð eisini funnin í skrivstovunum hjá summum londum so sum Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi og Spania.

Eingin veit, hvør hevur lagt lurtiútgerðina har, men keldur á ES-borgini siga, at talan er um so snildisliga framferð og so nútímans útgerð, at tað kann bara vera ein av teimum væl útbygdu fregnartænastunum, sum stendur aftanfyri. Heldur eingin veit, hvussu leingi lurtiútgerðin hevur verið har. Eingin sigur, at tað er amerikanska fregnartænastan CIA, men summar keldur vísa á, at amerikanarar hava havt áhuga í, hvat júst Bretland, Frakland, Týskland og Spania hava sagt í seinastuni í sambandi við Irak-kreppuna.

Onga olju úr Alaska

Amerikanska senatið hevur felt eitt uppskot hjá stjórnini um at loyva olju- og gassvinnu í teimum arktisku náttúruøkjunum í Alaska.

Stjórnin í Washington vil fegin sleppa at vinna olju og gass í økjunum, tí tað hevði gjørt USA minni heft av olju úr øðrum londum, men tey, sum eru ímóti ætlanini, siga, at oljan og gassið haðani høvdu gjørt lítlan mun.

Republikanski flokkurin hjá George W. Bush, forseta hevur meiriluta í senatinum, men fleiri republikanskir senatorar atkvøddu saman við demokratunum ímóti uppskotinum hjá stjórnini.